# Miðlatøknilærlingar til Kringvarp Føroya

**Søkt verður eftir tveimum lærlingum til útbúgvingina Film – og sjónvarpsframleiðslu (Miðlatøkning). Útbúgvingin fevnir um alla kringvarpsframleiðslu, tó við denti á at avmynda og at klippa video og ljóð. Útbúgvingin tekur 5 ár, harav eru 70 vikur skúlagongd í Danmark.**

**KRØV**
Tú skalt helst hava miðnámsútbúgving – HH-, HF- ella studentsprógv. Hevur tú harafturat ”Film- og TV-linjen, Grundforløb” frá góðkendum skúla, er tað ein fyrimunur. Tú skalt hava koyrikort, vanliga litsjón, góða hoyrn, vera fleksibul og kunna arbeiða skiftandi tíðir.

**VIT LEGGJA DENT Á, AT TÚ HEVUR:**
- oyra fyri tónleiki og skapandi og visuell evni
- skil fyri og royndir við teldum og talgildum miðlum
- góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt og undir trýsti
- áhuga fyri samfelags- og mentanarviðurskiftum og fólki

**VIT BJÓÐA:**
eitt avbjóðandi læurupláss í einum kreativum og skiftandi umhvørvi.

**SETANARVIÐURSKIFTI**
Lærutíðin byrjar skjótast til ber, tó við fyrivarni fyri samskipan við skúla. Lønin í lærutíðini verður goldin sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið. Royndartíðin er tríggjar mánaðir.

**UMSÓKNIR**
Umsókn við CV, prógvum, viðmælum og møguligari verkætlan* skal sendast til umsokn@kvf.fo í seinasta lagi 6. juni 2019. Merk teldupostin “Lærlingur” í evnisrútin. Skrivliga tilfarið skal sendast sum ein samlað PDF-fíla.

***VERKÆTLAN**
Verður tú kallað/ur inn til samrøðu, kanst tú í hesum sambandi lata Kringvarpinum eina verkætlan, ið tú sjálv/ur hevur verið við til at gera, og tú skalt greiða frá tínum leikluti í verkætlanini.

Miðlatilfarið kann sendast við t.d. Dropbox e.l. í hesum formatum:

Video: MPEG4-fílur í H264 codec; audio: MP3 í minst 256 kbit/s 44,1 KHz; stillmyndir JPEG.

Dømi:
- Stuttur filmur ella brot úr filmi (í mesta lagi 4 min.)
- Stuttur dokumentarfilmur ella brot úr dokumentarfilmi
- Tónleikavideo
- Stillmyndasøga (í minsta lagi 8 myndir)
- Grafisk ella listarlig framløga

Um tú ynskir meira kunning, ert tú vælkomin at venda tær til Bjarnheðin í Hoyvík, telefon 296655, ella teldupost bih@kringvarp.fo.

KRINGVARP FØROYA

Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini. Kringvarpsstjórin stjórnar stovninum við tilvísing til stýrið, ið telur sjey limir. Virksemið verður fíggjað við kringvarpsgjaldi og inntøkum frá kunngerðum, ískoytisveitingum og eydnuspølum. Kringvarp Føroya hevur fýra deildir: Aktuelt, Mentan, Tøkni og Fyrisiting. Umleið 80 fólk eru í føstum starvi á stovninum.